# Skipaeftirlitið flutt



*Óla Hans Hammer Olsen, stjóri á Skipaeftirlitinum, á nýggju skrivstovu síni á Skipaeftirlitinum*

**Skipaeftirlitið er nú endaliga flutt til Miðvágs. Móttøka var seinnapartin týsdagin í nýinnrættaðu hølunum í Gomlu Smiðju í Miðvági**

MÓTTØKA
*Edvard Joensen*

**Miðvági:** Væl av fólki hevði leitað sær til móttøkuna hjá Skipaeftirlitinum í Miðvági seinnapartin týsdagin.

Fólk vóru í góðum lag og ynsktu Eftirlitinum góðan byr, nú flutt er út á bygd. Heta er fyrsti almenni stovnur, sum hevur høvuðsskrivstovu uttan fyri Havnina, vildi stjórin, Óla Hans Hammer Olsen, vera við.

Eftir at hava heilsað upp á fólk og tikið í móti heilsanum og gávum til stovnin, beyð stjórin alment vælkomin í stuttari talu, hann helt fyri samkomuni. Óla Hans takkaði starvsfólkinum fyri gott samstarv og Smiðjuni í Miðvági fyri sera góð høli.

Eisini Jørgen Niclasen, landsstýrismaður við fiskivinnumálum, helt røðu, har hann millum annað fegnaðist um, at stovnurin nú er fluttur vestur í Vágar.

Tá klokkan var farin gott og væl av trý, fóru fólk so smátt at órógvast, tí tey skuldu aftur um Vestmannasund, og nú var ikki so leingi, til ferjan fór av Oyrargjógv. Og meðan streymurin av bilum tók til niðan av bryggjuni í Miðvági, stóðu vágafólk bara og nikkaðu.

–Jú,hatta kenna vit til, helt onkur, sum eftir stóð.



*Formaðurin í Skipara- og Navigatørfelagnum, stakk eisini inn á gólvið*



*Borgarstjórin í Miðvági, h.m., ynskir vælkomin og tillukku við hølunum*



*Stjórin á Skipaeftirlitinum og komandi sendimaður Føroya í London, John Rajani*



*Jørgen Niclasen var møttur við familjuni. Skrivarin í Reiðarafelagnum og stjórin á Skipaeftirlitinum lurta eftir Jørgeni*



*Borgarstjórin í Sandavági heilsaði eisini upp á stjóran á Skipaeftirlitinum og landsstýrismannin*



# Ríkisfundur í Miðvági

**Týsdagin og mikudagin var ríkisfundur í Vágum.**

RÍKISFUNDUR
*Edvard Joensen*
*& Heri á Rógvi*



*Anders Fogh Rasmussen og Jonathan Motzfeldt komu til landið týsdagin, tá tók Anfinn Kallsberg ímóti teimum. Anders Fogh fór avstað mikumorgunin. Jonathan Motzfeldt verður verandi í Føroyum til Útnorður toppfundin*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Fløggini vóru vundin á stong í Miðvági, tí ríkisfundur skuldi vera í bygdini.

Luttakararnir til ríkisfundin, sum koma skuldu uttaneftir, komu í Vágar klokkan knapt fimm seinnapartin týsdagin. Við flogfarinum hjá Atlantsflog vóru saman við Andersi Fogh Rasmussen, forsætisráðharra, eisini Jonathan Motzfeld, grønlendskur landsstýrisformaður, og fylgi teirra.

Forsætisráðharrin kom fyrstur úr flogfarinum. Hann gekk eftir fremru landgongini.

Aftaru megin kom grønlendski landsstýrisformaðurin. Hann løgdu tey fæstu merki til, tí øll stúgvaðust um forsætisráðharran. Men Jonathan er ikki dottin burturímillum, so hann varð skjótt miðdepulin, tá hann blandaði seg í tosið.

Løgmaður var á flogvøllinum og tók í móti gestunum, eins og ríkisumboðð eisini var.

Fylgið varð við bussi koyrt niðan á Hotel Vágar, har tey skulu búgva í nátt, og beint eftir varð farið til Miðvágs.

Nýliga yvirtikna Skipaeftirlitið var karmur um ríkisfundin. Skipaeftirlitið er júst flutt í nýggj høli í Miðvági. Har heilsaðu teir uppá borgarstjóran í Miðvági, stjóran á Skipaeftirlitinum og Jørgen Niclasen, landsstýrismann. Jørgen Niclasen greiddi m.a. frá, at teir vóru í holt við at umskipa seg, eftir júst at hava yvirtikið málsøkið og farin í nýggj høli. Eisini nevndi hann, at teir í hesum døgum stríðast við at sleppa av teimum sokallaðu svørtu listunum yvir skip í sigla í altjóða sjógvi.

Anders Fogh nýtti eisini høvið til at spyrja eitt sindur um forvitnisligu húsini, ið Skipaeftirlitið húsast í.

Eftir nakrir spurningar og ein lítlan rundtúr, var klárt at sessast við búgvið borð til árliga ríkisfundin.

Eftir ríkisfund og tíðindafund varð farið til Sørvágs, har døgurði var fyri leiðarum og embætisfólki í hølunum hjá Sørvágs Húsmøðrafelagi.

Mikumorgunin vóru fundir í Bø. Hesir eru umrøddir aðrastaðni í blaðnum.

### Næsta vitjanin

Hetta er aðru ferð, at Anders Fogh Rasmussen er í Føroyum sum danskur forsætisráðharri. Hann var í januar mánaði á arbeiðsvitjan í Føroyum, har hann hitti landsstýrið og Løgtingið. Eisini hevði hann ein fund saman við Sambandsflokkinum, sum er bróður flokkur hjá Venstre, ið Anders Fogh Rasmussen umboðar.

Anders Fogh kom tá til landið við teimum ørindum sum nýggjur forsætisráðharri at rætta álitið uppaftur millum Føroyar og Danmark. Tónin varð vorðin nakað dapur, meðan Poul Nyrup Rasmussen ráddi fyri borgum. Tá Fogh fór avaftur landinum eftir stuttu vitjanina, so var tað við einum betri tóna millum Danmark og Føroyar, og allar flokkar vóru á einum málið, at Fogh tænir teirra áhugamálum.

Danski forsætisráðharri og løgmaður lótu frá sær eina felagsfráboðan, sum undirstrikaði, at báðir partar vildu arbeiða víðari við yvirtøkum innanfyri ríkisfelagsskapin.

# Ríkisfelagsskapurin blómar

**–Tað gleðir meg at síggja, at ríkisfelagsskapurin blómar, segði Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri á tíðindafundi eftir ríkisfundinun**

RÍKISFUNDUR
*Heri á Rógvi &*
*Edvard Joensen*



*–Ríkisfelagsskapurin blómar, segði Anders Fogh Rasmussen*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tað var gott lag á monnum, tá skipað varð fyri tíðindafundi eftir ríkisfundin týsdagin. Teir tríggir, Anders Fogh Rasmussen, Anfinn Kallsberg og Jonathan Motzfeldt, høvdu sitið á fundi nakað yvir tveir tímar.

Anfinn Kallsberg gjørdi frá byrjan greitt, at teir á fundinum høvdu tosað um yvirordnað mál, sum hann tók til.

–Vit hava allir kunnað um búskaparligustøðuna í teimum trimum londunum. Forsætisráðharrin hevur greitt frá, um støðuna og gongdina í ES. Tosað varð eisini um ríkisfelagsskapin, har eg og Jonathan Motzfeldt kunnaðu um sjálvstýrisgongdina í Føroyum og Grønlandi, segði Anfinn Kallsberg.

Hann kallaði fundin fyri sera góðan. Løgmaður sá eisini góðar møguleikar fyri at økja um samstarvið.

Sjálvstýrisgongdini í Føroyum varð bert leysliga viðgjørd, og eingin broyting er í teirri felagsfráboðan um yvirtøkur frá januar mánað. Bæði danir og føroyingar eru til reiðar at samráðast um hvørja yvirtøka sær innanfyri ríkisfelagsskapin. Anfinn Kallsberg og Anders Fogh Rasmussen søgdu, at blokkstuðulin ikki var tikin upp á tungu.

Danski forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, var ikki minni positivur enn løgmaður. Hann slegði fæst, at fundurin hevði verið góður, og ríkisfelagsskapurin hevur tað ógvuliga gott í hesum døgum. Ríkisfelagsskapurin blómar, segði Anders Fogh Rasmussen.

Hann segði, at partarnir høvdu tosað um ríkisrættarligu viðurskiftini og staðfest, at tað stendur væl til.

Um viðurskiftini Danmarkar og Føroya ímillum segði hann, at Heimastýrislógin er ikki statisk og broytist alla tíðina.

–Tað skulu arbeiða uppá, og vit skulu útbyggja og nýmótansgera hana, segði danski forsætisráðharrin.

Anders Fogh Rasmussen nevndi eisini, at hann metti tað vera ógvuliga natúrligt, at kjak var millum manna um sjálvstýrisspurningar og indentitet. Hann stuðlar eisini tilgongd, har tað er føroyska og grønlendska fólkið, ið sjálvi taka avgerðirnar, um ein framtíðarleiklut innanfyri ella uttanfyri ríkisfelagsskapin.

Svarið til flest allar spurningar frá Anders Fogh var, at hann ikki vildi blanda seg í intern føroysk viðurskifti.

Eisini spurningurin viðvíkjandi ES-limaskapi hjá Føroyum, vildi danski forsætisráðharrin ikki gera aðra viðmerking til enn, at hetta var ein spurningur, føroyingar sjálvir máttu taka støðu til.

Eisini Jonathan Motzfeldt lat væl at fundinum.

–Tað er skeivt at isolera seg á ísinum, og vit vilja fegnir samstarva og vísa, at vit eru ein partur av Evropa, segði Jonathan Motzfeldt.

Hann umrøddi eisini kvotuspurning millum Grønland og ES. Eisini Anfinn Kallsberg hevði føroysku rækjukvoturnar á orði á ríkisfundinum.

### NATO

Eitt mál, sum seinastu dagarnar hevur fingið nógva umrøðu í fjølmiðlunum, er spurninginum um støðuna hjá Føroyum viðvíkjandi NATO.

Anders Fogh Rasmussen vildi ikki gera nakra serliga viðmerking. Fundurin hevði givið tað úrslit, at føroyingar og danir vóru positivt innstillaðir yvirfyri einum samstarvi viðvíkjandi verjupolitikkinum.

Løgmaður gjørdi greitt, at hann kundi hugsað sær, at føroyingar tóku størri ábyrgd á verjuøkinum.



*Ríkisfundurin gekk upp á stás, og allir tríggir vóru teir nøgdir*
*Mynd: Jens Kristian Vang*